LM-099/2023

Fylgiskjal 62

23. februar 2024

Til Uttanríkis- og Vinnumálaráðið

Hoyringarskriv: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Yvirskipað er talan um eitt gott uppskot, sum eg meti fer at tæna vanliga borgaranum í Føroyum væl.

Tað er umráðandi at tryggja fólkinum rætt at ganga í egnum landi, og tað hevur stóran týdning at fáa óunniligu gjaldsportrini burtur.

Umráðandi at tryggja rættin at ferðast í náttúruni
Eg fegnist serliga um grein 3 í lógaruppskotinum *"Við teimum avmarkingum og skyldum, sum eru ásettar í hesi løgtingslóg, í reglum, givnar við heimild í hesi løgtingslóg ella í øðrum løgtingslógum og fyriskipanum, er einum og hvørjum frítt at ferðast uttangarðs og fram við strondini."*

Tað er sera tiltrongt, at rætturin at ferðast í føroysku náttúruni verður staðfestur í lóg.

Nógv lond í Evropa og flestu grannalondini hava tryggjað rættin at ferðast og uppihalda seg í náttúruni. Rætturin er galdandi bæði fyri landsins íbúgvar og útlendingar.

Føroyingar hava drúgva siðvenju at ganga í haganum – bæði í arbeiðsørindum, at ferðast millum bygdir og bert fyri at njóta náttúruna. Ikki so fáar yrkingar, sangir, bøkur og málningar eru komin burturúr vitjanum í náttúruni. Hesa siðvenju skulu vit verja. Hon er trygdin fyri, at uppvaksandi ættarliðið fær kunnleika og tokka til náttúruna. Forðingar styggja og fremmandagera.

Hvat verður oyðilagt?
Nakrir festarar og ognarar eru ónøgdir um uppskotið og vilja vera við, at tað fer at oyðileggja náttúru, landbúnað, mentan, bygdir, privata initiativið - ja hetta er sum at tvangsflyta fólk, var tað onkur sum hótti við. Vit fara at fáa milliónir av fólki í føroysku hagarnar, ja upp í 10 milliardir av fólki, vil onkur annar vera við. Uppskotið fer at skrykkja beinini undan øllum vinnuligum virksemi úti um landið, hevur eisini verið sagt í kjakhitanum seinastu vikurnar. Og so eru tað tey, sum siga at fólk hava onki at gera í haganum, og ongin eigur at fara út um bøgarðarnar, uttan at spyrja um loyvi.

Eg eri sjálv bygdafólk, havi jørð og seyð (eri festari í Hesti) og eri sera góð við náttúruna. Og eg eri púra ósamd við hesum postulátunum!

Sjálvsagt skulu landsins borgarar kunna leita sær út í náttúruna. Føroyingar hava altíð verið góðir við náttúruna og gingið í haganum. Hesa siðvenjuna eru vit faktisk við at knúsa við hesum nýggja rákinum við gjaldsportrunum og retorikkinum seinastu árini.

Vit hava seinastu tíðina dømir um, at føroyingar, sum eru farnir sunnudagstúr í hagan, eru meldaðir fyri at fara út um bøgarðarnar. Flestu okkara eru helst samd um, at hetta er púra burtur

úr vón og viti. Vanlig hampafólk, sum í mong ár hava gingið ein ávísan tein ella vitjað ávíst stað í haganum, uppliva knappliga at fáa krøv um gjald, ella at tey skulu spyrja um loyvi at fara í hagan. Er tað nakað, sum fer at oyðileggja okkara mentan, okkara fatan av at vera føroyingar og okkara alsk til náttúruna, so er tað júst slíkir tilstandir, at fólk ikki longur tora út í náttúruna. Tí hastar tað at lógartryggja rættin at vera í náttúruni!

Eg havi eitt sindur torført at skilja, hvat gerst øðrvísi hjá okkum, hava jørð um hendi. Vit hava framvegis møguleika at reka landbúnaðarvirksemi, sum vælsaktans var tí vit valdu at yvirtaka festibrævið ella keypa/arva jørðina. Vit hava eisini møguleika at reka ferðavinnuvirksemi við at veita tænastur so sum ferðaleiðaravirksemi, selja mat o.a.

Lógaruppskotið nevnir týðiliga, at fólk skulu taka fyrilit *"so at tey ikki eru eigara, brúkara, fenaði, náttúru, mentanararvi ella øðrum at skaða ella til ampa", sum tað stendur í grein 4".* Eisini okkara grannalond hava tilsvarandi reglur um at fara væl um og ikki at vera náttúruni at meini.

At ganga skal ikki vera upp á náði
At eg eri festari ella at mín familja hevur ognarjørð skal ikki vera ein heimild til at ekskludera onnur í haganum. Festibrævið ella ognarbrævið gevur tær rætt til at hava eitt ávíst tal av seyði í haganum og nøkur ásett lunnindi. Eftir mínum tykki er tað ómetaliga nasadjarvt og hástórt at halda, at fyri tí at tú hevur nakrar merkur ella gyllin í jørð, so hevur tú rætt til at avgera, hvør skal sleppa út um bøgarðarnar.

Ofta verður sagt, at tað er ikki neyðugt at lógarfesta rættin. Føroyingar "skulu sleppa at ganga frítt og skulu ikki gjalda" verður ofta sagt. Sjálvandi skulu teir ganga frítt. Hetta skal ikki vera upp á nakra náði frá mær sum festara ella einum ognarfólki, sum hevur keypt sær jørð og seyð. Rætturin má og skal tryggjast í lóg.

Gjaldsportur – ein boomerangur
Tað týdningarmesta er, at borgarar í Føroyum kunnu ganga frítt í egnum landi. Summi halda tað vera í lagi, at útlendsk ferðafólk gjalda fyri at fara út í hagan, og at gjaldið kann inkasserast við eitt gjaldsportur/gjaldsskipan á staðnum. Eg eri ósamd. Eg haldi ikki, at vit festarar ella ognarar skulu hava rættin at taka gongugjald – hvørki frá føroyingum ella útlendingum. Eftir mínum tykki er hetta ein vandamikil leið.

Gjaldsportur kunnu gerast ein boomerangur bæði fyri landbúnað, bygdirnar og fólkið. Tað kann tykjast freistandi nú. Men vandi er fyri, at um vit knæseta prinsippið um gongugjald, kann landbúnaðarjørðin enda á nøkrum heilt fáum hondum um nøkur ár. Jørðin fer at verða keypt primert við tí fyri eyga at krevja gongugjald (lætt tjentir pengar) og í minni mun fyri sjálvt landbúnaðarvirksemið. Spurningurin er so, hvør fer at eiga jørðina tá. Hotelleigarar? Reiðarar? Útlendingar við føroyskum strámonnum? Vit kunnu hóskiliga spyrja, hvar valdið og rættindini hjá bygdini og teimum lokalu verður? Hvussu verður við atgongdini hjá teimum lokalu til náttúruna rundan um bygdina?

Tí meti eg, at gjaldsportur/gongugjald kunnu vera ein stór hóttan móti okkara mentan, náttúru og landbúnaðarvirksemi. Tað er at fegnast um, at grein 12 í lógini leggur upp til at banna gjaldsportur.

Í kjakinum um hesa lóg um burðardygga ferðavinnu verður tað ofta sett upp soleiðis, at ert tú av bygd, so ert tú fyri gjaldsportri. Bygdarfólkið verður onkusvegna spent fyri gjaldsporturs-vognin hjá ávísum festarum/ognarfólkum. Mín varhugi er, at nógv bygdarfólk als ikki eru fegin um hesi portrini/gjaldsskipanirnar. Atgongdin til haga og náttúruni er alt meira farin at snúgva seg um pengar. Men tað er ikki altíð so lætt at tala at, tá ið tú býrt so tætt saman og ert tætt í familju, sum viðurskiftini nú einaferð eru í Føroyum.

Ein tsunami av gjaldsportrum
At fleiri bøndur geva ilt av sær, nú lógaruppskotið leggur upp til at banna gjaldsportur, er rættiliga ófrættakent. Hetta vísir greitt, at vit tíverri kunnu vænta okkum eina tsunami av gjaldsportrum í Føroyum komandi árini! Er hetta veruliga tað, vit ynskja okkum? Einar Føroyar við píkatráði, stopp-skeltum og vaktarfólki við garðarliðini.

Eg havi hoyrt fleiri føroyingar siga, at útlendingar – turistar – eiga at gjalda fyri at sleppa út í náttúruna. Og helst gjalda nógv. Hetta er bæði óvinarligt og heimføðisligt. Tí vit føroyingar eru sjálvir millum ídnastu turistar. Vit dáma ikki at síggja okkum sjálvi sum turistar, men tað eru vit, tá vit við óteljandi flogførum valfarta til Gran Canaria, Malorka, Barselona, Italia, Danmarkar og aðrastaðni at ferðast, ganga, sóla okkum, drekka vín, taka myndir av fittum húsum og klæðum á snórinum, fáa d-vitaminir, uppliva náttúruna og so framvegis. Eisini føroyskir bøndur. Og so gerst tað ikki sørt pínligt at síggja somu fólk gartera á sosialu miðlunum um, hvussu skaðilig hendan innrásin av útlendskum ferðafólki er fyri Føroyar...

Sveits, Skotland, Noreg og onnur
Okkara grannalond hava ikki gjaldsportur. ØLL – bæði landsins borgarar og útlendingar – hava frítt at fara í náttúruni. Hesin rætturin verður vanliga nevndur alramannarættur. Sjálv havi eg gingið í náttúruni uttanlands, m.a. Italia, Fraklandi, Eysturríki, Danmark og Noregi. Eg havi ongantíð møtt einum gjaldsportri.

Í Sveits hevur fría atgongdin hjá fólki til náttúruna verið lógarfest síðan 1907, og í Eysturríki varð hesin rættur lógarásettur í 1920´unum. Í Noregi bleiv alramannarætturin staðfestur í Friluftsloven í 1957. Undan tí var norski alramannarætturin óskrivaðar reglur, ið vóru grundaðar á siðvenju. Í Skotlandi er drúgv siðvenja hjá fólki at vera í náttúruni. Í 2003 varð hendan siðvenjan formelt ásett í lóg við Land Reform (Scotland) Act. Eisini Svøríki, Ísland og Finland hava alramannarætt, umframt onnur lond.

Í veruleikanum er alramannarættur ein aldargamal rættur, sum gevur fólki grundleggjandi rættindi at ferðast frítt í náttúruni. Hann er eins gamal og mannaættin, tí menniskju hava altíð ferðast í náttúruni, eitt nú til at veiða, fiska, henta frukt/grønmeti, handla, flýggja undan fíggindum o.s.fr.

Reglurnar og siðvenjurnar kunnu vera ymiskar frá landi til land, men grundleggjandi gevur alramannarætturin fólki rætt til at:

- ferðast í náttúruni
- dvølja/hava tilhald í náttúruni (t.d. tjalda)
- heysta (t.d. henta ber)

Rætturin er galdandi líkamikið hvør eigur lendið, og fólk skulu hvørki spyrja um loyvi ella gjalda. Alramannarætturin hongur neyvt saman við skyldum at virða náttúruna og at fylgja ásetingum um skynsaman atburð.

Í hesum londunum leggja myndugleikarnir stóran dent á at gera góðar gøtur, tí tey halda tað vera umráðandi at skapa og varðveita tilknýtið millum fólk og náttúru. Tey hava álit á, at landbúnaður og vinnulív hava so mikið gott hugflog, at tey duga at finna aðra inntøkukeldu enn at seta eitt gjaldsportur upp. Tíbetur hava vit nógv góð dømi í Føroyum um innovativar bøndur, sum hava loftað ferðavinnuni og gjørt tað til ein vinnuveg at veita mat, náttúruupplivingar við ferðaleiðara, gisting o.a.

Skal eg sum festari hava ein bita av ferðavinnuni, ja so má eg veita eina tænastu. Gjaldsportur er nevniliga ikki ferðavinna. Gjaldsportur eru bara gjaldsportur.

Bøndur vísa javnan á, at lítið fæst burtur úr landbúnaðinum, at føroyski landbúnaðarstuðulin er nógv minni enn í øðrum londum, og at kappingin tí er ójøvn. Hetta er rætt og eigur at gerast nakað við. Men hetta er nakað, sum skal skipast gjøgnum landbúnaðarlóggávu - og ikki við gjaldsportrum.

Hvør tøssar, hvør gongur, hvør oyðileggur?
Eg, eins og flestu føroyingar, vil varðveita náttúruna. Men vit eru nokk eitt sindur ósamd um, hvat tað er, sum oyðileggur. Seinastu árini hevur verið ein heldur arrogantur, almennur retorikkur, at øll onnur fólk enn bóndin mala, tvassa, tøssa og oyðileggja. Jú, gongd ávirkar. Men tað gera lendisakfør, seyðabit, órudd, rustað hegn, grótbrot o.a. eisini. Skulu vit eymka okkum um náttúruna, so mugu vit taka ALT við. Eisini okkara egnu oyðilegging. Um vit líta okkum íkring at hyggja eftir størstu sárunum í náttúruni, er kanska ein brøkpartur av sliti frá fólki til gongu.

Sjálvandi skulu ábøtur gerast, har slit er í lendinum. Lógin leggur upp til eitt náttúruverndargjald (150 kr), sum útlendsk vitjandi skulu gjalda, tá ið tey koma til Føroya. Peningurin skal so býtast út til kommunur, bygdir og tey, sum varða av høgunum. Eftir mínum tykki er hetta gjaldið ov lítið til gera og viðlíkahalda gøtur. Meira peningur má leggjast í hendan kassan frá byrjan. Antin við at hækka náttúruverndargjaldið, ella við at landið setur pening av á fíggjarlógini.

Vit skulu eisini vera til reiðar at avmarka vitjanir til støð, har mett verður, at náttúran er hótt. Í januar kom nýggja Náttúruverndarlógin í gildi, og í henni eru amboð og heimildir at gera hesar metingarnar. Men tað er umráðandi, at neyðugur peningur og orka er sett av, so hetta umráðandi arbeiðið kann gerast.

Nógv lond liva av ferðavinnu, men summastaðni uppliva íbúgvarnir, at tað eru ov nógv ferðafólk. Venedig í Italia er eitt dømi. Hóast vit í Føroyum hava lutfalsliga fá ferðafólk, so eiga vit sum land regluliga gera metingar av, hvussu nógv ferðafólk eitt lendi, ein bygd ella býarpartur tolir. Og so seta átøk í verk at minka um trýstið.

Ov nógvur barnagentuhugburður

LM-099/2023

Í uppskotinum um Ferðavinnulóg eru nakrar ásetingar um ferðavinnuætlanir, skilhaldsreglur og trygd, sum kunnu vera eitt sindur ivasamar (grein 6, 9 og 11). Lagt verður m.a. upp til (grein 6), at gøtur/leiðir skulu torleika- og váðametast, at øki skulu kunna steingjast av trygdar ella verndarávum. Eisini leggur grein 11 upp til, at summastaðni skal bara vera loyvt at ferðast við staðkendum feraleiðara, og at serliga vandamikil støð skulu kunna vera stongd ávísa tíð á árinum ella samdøgrinum.

Sjálvsagt skulu fólk vera varin í haganum, men hesar greinarnar tykjast at fara alt ov langt í "barnagentuhugburði". Hvør skal meta um, nær eitt stað er ov vandamikið at ganga? Ein bangin kommunustýrislimur, sum heldur at alt oman fyri 400 metra hædd er vandamikið? Ella ein landsstýrismaður, sum heldur tað vera ein óskikkur at ganga í haganum eftir klokkan 20 á kvøldi?

Flestu føroyingar duga at meta um trygd. Sjálvandi eru undandøk, men tey allarflestu duga at brúka vit og skil. Tað vildi verið sera óheppið, um hesar nýggju reglurnar fara at forða føroyingum í at ganga í náttúruni. Lógin má undir ongum umstøðum føra við sær, at føroyingar fáa verri rættindi og møguleikar at fara í hagan enn frammanundan. So er lítið vunnið.

Vinarliga
Óluva Zachariasen, festari í Hesti